# Lívið er sum ein marknaður

## »Sånger från andra våningen« av Roy Andersson

**Roy Andersson hevur í hesum filminum stóra flogið, sum einans veruliga stórir leikstjórar annars hava – ella autørar, sum teir eita á filmvísundamálið, ið eru hesir filmleikstjórar, ið bæði skriva og leikstjórna sínar egnu filmir. Hann er í hesum filmi eins kompromileysur sum stórir instruktørar sum Ingmar Bergmann, Carl Theodor Dreyer, Akira Kurosawa, Andrei Tarkovsky, Federico Fellini og Krzysztof Kieslowski, skrivar Kim Simonsen í hesi viðgerð av svenska filminum »Sånger från andra våningen” sum sviin, Roy Andersson skrivaði og leikstjórnaði í fjør**

### Filmar hjá Roy Andersson

| | |
|---|---|
| Besoka sin | 1967 |
| Hamta en cykel | 1968 |
| Lordagen den 5.10. | 1969 |
| En kærlighedshistorie | 1970 |
| Giliap | 1975 |
| Der er sket noget | 1987 |
| Dejlig er jorden | 1991 |
| Sånger från andra våningen | 2000 |

### Fakta um Sånger från andra våningen

Filmurin er 1 tíma og 40 minuttir. Svøríki 2000. Dolby SR Loyvdur fyri øll yvir 11 ár. Import & distributión: Camera Film. Týðing Lise Schmidt Mahler. Tónleikurin frá filminum, ið er gjørdur av Benny Andersson, er útkomin her á vári 2001.

### Ummæli:

Bogart

Politiken

Jyllandsposten

»Dyb forunderlig – ein udsøgt fabel«

Berlinske Tidende.

### Bøkur:

Martin Buber: ”Ich und Du”. 1923
César Vallejo: ”Udvalgte digte”. Husets Forlag, 1978.
César Vallejo: ”Den sorte herold. Antologi over det lyriske værk”. Husets Forlag, 1997.
Mattias Goransson:”Återkomsten”, Í: Filmkonst, nummar 69, 2000.
Roy Andersson: ”Vår tids radsla for allvar”. Í: Filmkonst, 33, 1997.
Roy Andersson: ”Lyckad nerfrysning av herr Moro”. Ordfront, 1997.

(Yrkingin »Snublende mellem to stjerner« hjá César Vellejo er leystligani tydd úr svensku tyðingini hjá Peter Landelius og donsku týðingini hjá Lise Schmidt Mahler).

SEINNI PARTUR

*Kim Simonsen*

*»Elskaður veri tann, ið hevur lús*
*tann, ið gongur í holutum skóm regndagar*
*tann, ið vakir við tveimum tennstikkum yvir líki av einum breyði,*
*tann, ið fær fingurin millum hurðina,*
*tann, ið ongan føðingardag hevur,*
*tann, ið hevur mist skugga sín í einum eldsbruna,«*

Kalle vendir sær til trúnna og vitjar eina kirkju fyri at royna at loysa upp fyri stóru sorg síni, men presturin skilir hann ikki og tosar bert um, at hann ikki fær selt hús síni. Hin feiti Kalle stendur mitt á kirkjugólvinum kolasvartur í sóti frá niðurbrenda handli sínum og grátandi sigur hann:

– tað er ikki lætt at vera menniskja!

Eitt slíkt brot er í sjálvum sær eitt listarverk.

Filmurin snýr seg um eina tíð, har fólk hava mist trúnna uppá nærum alt. Fólk hava mist trúnna uppá seg sjálvi, evni síni og møguleikan at forma síni egnu livikor. Stakkals feiti smáborgarin Kalle missir trúnna uppá alt og endar við at keypa sær ein stóran kross við tí krossefesta Jesusi, tí ein handilsmaður til eina sølustevnu sigur honum, at slíkir krossar fara at selja væl í framtíðini. Sjálvandi er tað eisini føðingardagurin hjá Jesusi, tað er hann, ið gerst 2000 ár. Trúgvin er enn ein handilsvøra Jesus ein persónur, tú kanst tjena pening uppá.

Kalle og handilsmaðurin vilja tjena pening uppá Guð. Somuleiðis vitja tey deyðu Kalle og kæra honum sína neyð, men hann ynskir tey bert burtur. Serliga er tað Sven, ið er ein deyður starvsfelagi, ið Kalle hevur snýtt fyri 287.000 krónur, ið hann ysnkir langt burt. Kalle hevur ta lívsfilsofi, at marknaðurin er alt:

»Lívið er ein marknaður, so einkult er tað. Tað er um at keypa okkurt, gjørligt er at selja við einum ekstra nulli«.

Hetta endurtekur Kalle gjøgnum allan filmin. Hetta gongur út yvir alt, bæði trúgv og mentanina. Á sinnissjúkrahúsinum sigur Kalli við sjúka sonin, at einki nyttar at skriva yrkingar, hetta at lívið er ein marknaður, hava øll í heiminum skilt uttan hann.

Seinni møta við seljarinum á einum ruskplássi, har hann blakar smáar og stórar krossar burtur, tí sjálvt hann hevur mist trúnna uppá, at slíkir krossar kunnu seljast longur. Og tá hann koyrir burtur í bilinum, koyrir hann á ein kross – eftir stendur Kalle. Tað er torført ikki at síggja hetta brotið sum umboð fyri reina ateismu.

Tey deyðu koma fram aftur. Menniskju sum Kalle vilja ikki loyva sær at vera opin fyri teim deyðu, og hetta er tað syrgiliga, tí postivi boðskapurin er, at tey deyðu kanska eru meiri livandi enn tey, ið liva. So absurd tað ljóðar er boðskapurin møguliga, at tey deyðu kunnu vísa vegin, men hetta krevur, at menniskjað aftur torir at trúgva upp á lív aftan á deyðan. Tá menniskja torir hetta, fer tað aftur at tora at trúgva uppá seg sjálvt. Men hetta er bert ein møguleiki, ein møgueliki, ið fólk sum Kalle ikki tora at rúma.

Gjøgnum allan filmin eskalerar alt, kreppan er allarstaðir, og bilarnir standa í stað. Tað tekur tímar at koyra eini 100 metrar. Alt økist í ferð, og tað kenst sum um menniskjuni eru umborð á eini søkkandi skútu. Alt og øll eru á ferð, í eini rørslu og eini leitan eftir eini meining ella einum máta at liva og yvirliva uppá. Ein ferð fylt við iva, meðan tíðin gongur og gerst alt knappari. Vit møta nógvum fólki í ymiskum umhvørvi, sum ikki altíð hava nakað við hvørt annað at gera.

Á eini jarnbreytarstøð hevur ein maður fingið hondina kleimda í millum hurðina á tokinum. Øll rundan um hann hyggja bert, og eingin tykist at vilja gera nakað við hetta. Kalle kemur framvið við einum stórum krossi, men aftan á hann kemur Sven. Sven er deyður, hann tók lívið av sær, og nú fylgir hann eftir Kalla.

Roy Andersson vil, sum allir góðir listamenn, royna at skilja, hvat menniskjað er ella kann vera. Tað er menniskjað sum fyribrigdi og skabningur undir ymiskum samfelagsviðurskiftum, ið er høvuðspersónurin í filminum. Filmurin vil royna at seta nakrar myndir fram av okkara virðum. Hetta ger sjálvandi filmin rættuliga torføran, men hetta verður javnvigað av, at filmurin er so sjúkliga stuttligur. Tað groteska og tragiska minnir nógv um tað tragikomiska, og tað tragikomiska er mangan eitt støði undir góðari list.

*Elskaður veri*
*tann, ið er svangur og tystur, men hvørki hevur hungur til at sløkkja tosta sín*
*ella tosta til at metta hungur sín*

### Er tað synd í menniskjanum?

Hvat kann meniskja gera við skuldina. Tá Kalle møtir Sven, sær Kalle, at hann ikki kann gjalda skuld sína, og Sven svarar honum róliga:

– Nei, til mín verður tað torført at gjalda nakra skuld

Sven er jú deyður, men tað liggur meiri í hesum.

Tyski og ísraelski kristni moralfilosoffurin, Martin Buber (1878-1965) verður citeraður í bókini hjá Roy Andersson:

– Vår tids radsla for allvar, fyri at siga, at:

– Eksistensiel skuldarkensla framkemur í heiminum, tá onkur ger seg inn á ein menniskjaligan ordan, sum hann sjálvur innast í sjálvum sær kennur og viðurkennur sum eitt støði undir sínum egna eksistensi og sum støði undir eksistensinum hjá einum og hvørjum menniskja”.

Kristna eksistensialistiska hugsjónin hjá Buber stendur fyri at berast kann í bøtuflaka fyri felags eksistensiella skuld, og at henda bót kann lekja óendaliga nógv onnur støð, enn har sárið í heiminum er uppstaðið. Buber sigur í høvuðsverkinum ”Ich und Du” frá 1923, at menniskjans tilvera finst í forholdinum millum spurningar og svar og í forholdinum millum okkum sjálvi og hini. Menniskjað verður til sum menniskjað, »eg« í viðurskiftinum til eitt »tú«. Menniskjað eisini verður spurt av einum ’ævigum tú’ (Guð) og gjøgnum gerðir sínar kann menniskjað svara upp á spurningin við at taka ábyrgd fyri egnari lagnu – hetta er at svara fyri seg.

Kalle hevur brotið seg inn á sítt egna »eg« við at traðka á »hini«. Hetta ger, at hann er um at missa sítt »eg«, tí hann kann, sum sjálv tíðin og menniskjuni, ikki svara fyri seg. Tá Sven sigur, at tað gerst torført at gjalda aftur, er tað í tí støðuni Sven, sum er tað »tú«. Sven er deyður, og samfelagið um at upploysast og doyggja, tí vónin, trúgvin og framtíðin er horvin. Tað Sven meinar er, at Kalle hevur mist seg sjálvan, tí at hann er partur av tíðini, henda tíðin uttan sál, vón og framtíð.

### Er postmodernaða menniskja friðhalgað?

*Elskaður veri tann, ið arbeiðir pr. dag, pr. mánað, pr. tíma,*
*tann, ið sveittar av skuldarkenslum ella av skom,*
*tann, ið á handsins rødd fer í biografin,*
*tann, ið skal gjalda við tí hann ikki hevur,*
*tann, ið svevur á rygginum*

Temaið í filminum er eisini um menniskjans integritet – ella um menniskjað er friðhalgað. Spurningurin er, um vit kunnu gerast so ólukkulig og koma so langt út, at vit byrja at gera okkum inn á einstaklingin? Tað er henda vitan og henda trúgv, ið er tað ’lím’, ið skuldi hildið einum samfelag saman. Tað er hesin tankin, ið hevur verið aðaltankin í okkara sivilisitatión og mentan. Og filmurin fer langt í at vísa, at menniskjað kann koma har út, har tað ikki longur trýr uppá menniskjans virði. Í einum brotið verður ein lítil fitt smágenta ofrað, sum eitt annað offurlamb, av embætismonnum, generalum og øllum landsins høgu myndugleikum, fyri at



støðga hesum óskilinum, men hetta hjálpir heldur ikki.

Aftaná sita hesi fínu politikarir, generalar og sjálv kongafamilian á eini fínari hotelbar og drekka seg skít, onkur spýr á bardiskin og á seg sjálvan, meðan ongin sigur nakað. Einki er at siga, alt er sagt og roynt. Hesir valdssvín og geldu teknokratar hava roynt alt, entá at ofra humanismuna, fyri enn einaferð at fáa rotna samfelagið at livna aftur. Hetta hjálpti ikki, tí í teirra egna svørtu hjørtum liggur skuldin og eins og Kalli duga tey ikki at skapa javnvág aftur í heimin. Áhugaverdi spurningurin er eisini um Vesturlendska samfelagið kann fella aftur til eina so óvitandi primitivismu og yvirtrúgv, sum tað er at ofra eitt óskyldugt barn? Barnið í filminum umboðar framtíðina, og við at ofra barnið, missir menniskja seinasta skansan í lívinum og sjálvt grundarlagið, ið er vitanin um, at menniskjað er friðhalgað.

Tá barnið doyr, tá doyr vónin um framtíðina eisini. Í filminum eru allar stórar og góðar søgur burtur, trúgv, kærleikin og vónin eru burtur. Tað finst ongin trúgv uppá stórar og meiningsgevandi samfelagsligar frágreiðingar longur. Eingin tekur sær av øðrum enn sær sjálvum og henda anarkistiska individualisman er endað í eini nýggjari primitivari hugsan. Ein heimur uttan trúgv, uttan Guð er eisini uttan vón og meining. Bæði menniskjans trúgv upp á seg sjálan og Guð endar á ruskdunganum, og vónin sveimar nærum í leysari luft.

Roy Anderssonsa dystopi, ella dapra framtíðarmynd kemst av at menniskjað ikki veit, hvat tað er longur, ella hvat tað skal gera, og tí dettur samfelagið og lívið hjá einstaklinginum sundur. Tað Roy Andersson vil vísa á er, at hitt sokallaða postmodernaða menniskja einki hevur at liva fyri. Við at vísa hetta fær hann eisini sagt, at hetta ikki eigur at vera soleiðis. Allar daprar myndir rópa ímóti vindinum og gera nógv fyri at støðga tíðarandanum. Hann skrivar menningina eini 10-20 ár fram í tíðina fyri at blæsa í ein ávaringarlúður. Meiningin við at gera ein dapran film er at loyva vónini og dreymunum út um rimarnar á okkara veruleika á gáttini til 21. øld.

Roy Andersson hevur í hesum filminum stóra flogið, sum einans veruliga stórir leikstjórar annars hava – ella autørar, sum teir eita á filmvísundamálið, ið eru hesir filmleikstjórar, ið bæði skriva og leikstjórna sínar egnu filmir. Hann er í hesum filmi eins kompromileysur sum stórir instruktørar sum Ingmar Bergmann, Carl Theodor Dreyer, Akira Kurosawa, Andrei Tarkovsky, Federico Fellini og Krzysztof Kieslowski.

»Sånger från andra våningen« er meiri enn stór svensk filmslist, hetta er alheims filmlist, ein filmur, ið vónandi skjótt kann keypast á video og fer at vera ein klassikari innan filmlistina.

*»Elskað verið barnið, sum dettur og grætur enn*
*og maðurin, ið er dottin og ikki grætur meiri!*
*Ak, so nógv! Ak, so lítið. Neyðars armingar!«*



*Roy Andersson hevur í hesum filminum stóra flogið, sum einans veruliga stórir leikstjórar annars hava – ella autørar, sum teir eita á filmvísundamálið, ið eru hesir filmleikstjórar, ið bæði skriva og leikstjórna sínar egnu filmir*

# Eitt sindur um Roy Andersson

Roy Andersson er føddur í Goteborg í 1943 í einum arbeiðaraheimi, og hann fekk í 1969 prógv frá Dramatiska Instituttet í Stokholm. Í 1970 leikstjórnaði hann sín fyrsta spælifilm og vann silvurbjørnina í Berlin við filminum “En kærlighedshistorie”. Hann hevur sínar røtur í arbeiðararørsluni, og hetta merkist í ”Sånger från andra våningen”, ið eisini er ein uppgerð við svenska Folkhemmet – ella Svenska Vælferðarsamfelagið, Javnaðarflokkin og alla Arbeiðararørsluna.

Stjórin, Pelle, svevur saman við einum LO-manni, ið stendur svøvnleysur í berari reyv og hyggur yvir býin. Sosialdemokratarnir eru partar av magtelituni á dekadenta Grand Hotel, saman við kirkjuni, vinnulívinum og kongahúsinum. Filmurin finst at stuttskygdu fíggjarligu spádómunum hjá vísmonnunum, ið einans vilja vísa á, at ikki er ráð til at arbeiða longur. Tað sein- ella postkapitalistiska samfelagið er óstøðugt. Altjóða pengingastreymarnir avgera alt, og hetta ger samfelagið veikt.

Serliga húðflettir hann nýggju kapitalismuna við at vísa, at elitan flýggjar yvir háls og herðar og sleppir sær av landinum, tá alt ikki longur gongur eftir teirra vilja.

Á flogvøllinum koma fleiri túsund fólk koyrandi við fjøllum av ferðagóðsi, meðan golfkylvarnir regna oman yvir flogvallargólvið. Men øll støðga og koma ongantíð fram til at tjekka inn á flogvøllinum. Hetta er ein ótrúgv og egoistisk altjóða elita, ið onga ábyrgdarkenslu kennir yvir fyri landi og fólki. Somuleiðis síggja vit fleiri ferðir eina gongu av vinnulívsfólki, ið píska og revsa seg sjálvi.

### Ein absurdur stílur

”Sånger från andra våningen” er sum sangir frá undirganginum, nærum øll, ið eru við í filminum, eru feit, týðuliga merkt av elli ella beinleiðis ljót. Roy Andersson er kendur fyri hetta groteska og fyri burlesku persónarnar, ið spæla við í hansara filmiska universi. Hann velur sínar persónar millum fólk, hann møtir á gøtuni. Kalle er t. d. ein typografur, hann møtti í IKEA. Roy Andersson er eisini ein royndur reklamufilmsleikstjóri, har hann hevur skapt henda serliga stíl, og hansara reklamufilmir hava vunnið nógvar altjóða prísir.

Týðuligt er at merkja eina inspiratión frá spanska leikstjóranum Louis Buñuel, serliga filmir sum ”The Discreet Charm of the Bourgeoisie”(1972) og ”Belle de jour”(1967). Tað absurda og groteska kemur haðani og víðari frá surrealismuni og absurdismuni í vannligari modernistiskari merking. Eisini er gjørligt at kenna aftur stílin hjá finska meistara leikstjóranum Aki Kaurismaki frá filmum sum ”I Hired a Contract Killer” – har ein kontórmaður, ið byr í heimsins minstu íbúð og koyrir í einum bili, ið er minni og ljótari enn ein Morris Mini, vil gera sjálvmorð, men hetta miseyðnast, og hann endar tí við at leiga ein kriminellan mann, at taka lívið av honum. Alt hetta sigur Kaurismaki frá fyrstu fimm minuttirnar av filminum uttan eitt einasta orð. Soleiðis er tað eisini við ”Sånger från andra våningen” myndirnar siga ótrúliga nógv og ymisk ting í senn.

Filmlistin hjá Roy Andersson er sum málningaog fotolist, tí myndirnar í filminum innihalda síni egnu heimar, og tí er serliga hesin filmurin so ómetaliga ríkur og heilskaptur, sjálvt um eingin vánnlig søgugongd er í filminum.

Myndiranr eru so klárar og einklar, at tær gerast ótømandi og hetta minnir meg um stóra greska filminstruktørin, Theo Angelopoulos og film hansara ”Ævinleikin og ein dagur”. Angelopoulos brúkar langar og stillar upptøkur fyri at fara í djúbdina og sum ein metafor, ið lýsir einsemi hja sálini. Men har Angelopoulos í filmum sínum roynir at finna ein veg og onkra vón, er Roy Andersson meiri dapur og kanska heldur uppgevandi. Men sosialistiska hjartað hjá honum bankar enn